## Twente vil nakað

FC Twente liggur í løtuni á odda í niðurlendsku fótbóltskappingini, og um vikuskiftið megnaði Twente at halda standa í toppdystinum ímóti Feyenoord. Dysturin millum feløgini endaði við javnleiki, og tí er Twente framvegis fimm stig frammanfyri Feyenoord og fýra stig frammanfyri Ajax. Seks umfør eru eftir at spæla í Hollandi, og higartil hevur Twente bert tapt ein av 28 dystum í kappingini.



## Rio fjaldi skaða

Verjuspælarin Rio Ferdinand vildi ikki viðurkenni, at hann fyrr í ár hevði álvarsaman ryggskaða. Hann royndi at spæla, men avrikini vóru svikalig. Í gjár greiddi Ferdinand frá, at hann hevði so nógva pínu í rygginum eftir dyst, at hann nóg illa sitið, gingið ella sovið uttan sterkan pínustillandi heiligvág. Ferdinand royndi at fjala pínuna, men var at enda noyddur at viðurkenna skaðan. Síðani hevur hann fingið viðgerð og tykist nú verða aftur í toppformi.

# Deildirnar verða víðkaðar

**Hondbóltsfeløgini eru samd um at víðka bestu Sunset- og Atlantic Airways-deildina, og arbeiðsbólkur skal gera upplegg til, hvussu tað skal gerast**



einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen


Komandi kappingarár verður Sunset-kappingin víðkað til átta lið, tí bæði Kyndil og Søljan flyta upp, og Atlantic Airways-kappingin verður víðkað til sjey lið, tí Team Klaksvík flytur upp. Sostatt verður eingin niðurflyting eftir hondbóltskappingina í vetur.

Hetta var ein av niðurstøðunum, tá 28 fólk frá 11 hondbóltsfeløgum leygarmorgunin hittust á hálvumfjórða tíma drúgvum limafundi í Havn. Nógv var longu fyrireikað frammanundan, so sleppast kundi undan, at fundurin í alt ov stóran mun fór niður í smálutir, men heldur viðgjørdi heildina.

Feløgini samdust um at seta ein arbeiðsbólk at koma við einum endaligum uppskoti um, hvussu farast skal fram, og í hesum bólki sita Ingi Olsen, Jógvan Martin Mørk, Justinus Justinussen, Hallur Danielsen, Jens Sivar Djurhuus og Anna Rein, sum er skrivari.

Arbeiðsbólkurin fer á fund í morgin, og ætlanin er at arbeiða skjótt, so viðurskiftini viðvíkjandi fremstu kvinnu- og mansdeildunum eru greið, áðrenn kappingin í vetur endar.



Hondbóltsfeløgini vóru væl umboðað á limafundinum leygardagin

Mynd: Jón Kragesteen

# Tjaldur mist flogið

**Grækarismessuhaldið tykist hava sett síni spor hjá meistarunum, sum ikki hava vunnið hesu megin hátíðina**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk


Alt kappingarárið hevur verið líkt til, at kvinnukappingin skuldi enda við nøkrum krútdystum millum verjandi meistararnar úr Tjaldri og steypavinnararnar úr Stjørnuni. Tað er framvegis púrasta vist, at tað verða hesi bæði liðini, sum spæla FM-finalurnar hjá kvinnunum, men síðani á grækarismessu tykist Tjaldur fullkomuliga hava mist flogið.

Fyri viku síðani tapti Tjaldur fyri Neistanum, sum alt árið hevur sitið tungt á bronsumerkjunum, og leygardagin máttu meistararnir lúta fyri steypafinalistunum úr VÍF, sum soleiðis fingu sett sær eitt flott punktum fyri einum kappingarári, sum veruliga hevur víst stóra potentialið, sum býr í liðnum.

Í Vestmanna var heimaliðið omaná mest sum allan dystin. Eitt lítið skifti tíðliga í seinna hálvleiki eydnaðist tó Tjaldri at toga seg framum, men so var eisini liðugt fyri dagin, og heimaliðið mest sum rann gestirnar um koll.

Tjaldur var eisini hesa ferð uttan skaddu Cornelia Rimbu, og spurningurin er, um tað eydnast at pjøssa hana saman til finaludystirnar. Undir ongum umstøðum verður dystarvenjing hennara tó optimal til ta tíð, og so er spurningurin, hvussu væl tað eydnast hjá liðfeløgunum at toga stórspælið, sum tær sýndu í fjør og fyrra partin av kappingarárinum í ár.

### Stjørnan favorittur

Stjørnan tykist hinvegin veruliga hava funnið sítt rætta gear, nú tað av álvara ræður mest um. Hesa ferð hevði Stjørnan lætta uppgávu í Vági, og hana loystu klaksvíkarkvinnurnar uttan nakað sum helst hóvasták.

Eydnast tað Stjørnuni at halda dampinum uppi eina góða viku afturat, og eydnast tað ikki Tjaldri veruliga at sveiggja seg upp móti sínum avgjørdu hæddum, er lítil ivi um, at FM-steypið enn einaferð finnur leiðina til Klaksvíkar, sum hevur verið mest støðugi bústaðurin hjá steypinum hesumegin aldarskiftið.

Seinasti dysturin hetta seinasta umfarið varð spældur í Havn, har Neistakvinnur kundu staðfesta síni bronsumerki við sigri á StÍF.

Fyrra helmingin av dystinum hekk StÍF væl og virðiliga í móststøðuni, men seks mál á rað fyrstu seks minuttirnar av seinna hálvleiki punkteraðu mótstøðuna fullkomuliga, og so kundi bláu heimakvinnurnar gera seg til reiðar at taka móti bronsumerkjunum.

# Reglurnar siga...

**Verða tvey ella fleiri lið jøvn í stigum, tá seinni FM-finalisturin í Atlantic Airways-kappingini skal finnast, verða innanhýsis dystirnir avgerandi**

Á stigatalvuni tykist Kyndil standa við veikastu kortunum, nú havnarfelagið kappast við VÍF, KÍF og StÍF um rættin at spæla FM-finalu móti Neistanum. Hetta tí málmunurin hjá teimum grønu er tann vánaligasti í deildini.

Tað er tó ikki málmunurin, sum í fyrstu atløgu er avgerandi, tá endaliga støðan verður gjørd upp.

Her eru reglurnar, at innanhýsis uppgerðirnar gera av, hvat lið er fremst, um tað stendur á jøvnum í stigum.

Í ár kann hetta roknistykkið eisini gerast heilt stuttligt, tí í teoriini kunnu tey fýra liðini øll enda jøvn í stigum eftir seinasta leikdag. Tað hendir, um VÍF tapir sín dyst móti Neistanum, samstundis sum hinir báðir dystirnir enda við javnleiki. Og sjálvandi kann eisini tað henda, at trý lið standa jøvn í stigum.

Um so er, at talan er um fleiri lið, verður stigatalva sett upp, har bert dystir hjá hesum liðum verða tald við. Fremsta liðið, sambært hesi alternativu stigatalvuni, er tá vinnarin av innanhýsis uppgerðunum og tí finaluklárt.

-mørk